NUMO

**P/F Faer Isles Distillery**
**Heygsbreyt 5**
**100 Tórshavn**

Umskapanarjavni pr. 24. februar 2021

Umskráseting av smápartafelag til partafelag

NUMO

# INNIHALDSYVIRLIT

Síða

**Átekningar:**

Roknskaparátekning .......... 3

Grannskoðanarátekning .......... 4

**Umskapanarjavni:**

Nýttur roknskaparháttur .......... 5

Umskapanarjavni pr. 24.02.2021 .......... 6

Notur til umskapanarjavna .......... 7

NUMO

## ROKNSKAPARÁTEKNING

Umskapanarjavnin, sum er greiddur av okkum, er settur upp samsvarandi føroyskari lóggávu. Umskapanarjavnin gevur eftir okkara tykki eina rættvísandi mynd av ogn og skuld hjá P/F Faer Isles Distillery.

Tórshavn, hin 24. februar 2021

**Stjórn:**

Dánial Hoydal

Bogi Karbech Mouritsen

NUMO

## Váttanir frá óheftum grannskoðara

***Til kapitaleigararnar í P/F Faer Isles Distillery***

Vit hava sett upp umskapanarjavnan pr. 24.02.2021 hjá P/F Faer Isles Distillery við støði í bókhaldi felagsins og øðrum upplýsingum, ið vit hava móttikið frá tykkum.

Umskapanarjavnin fevnir um nýttum roknskaparhátti, rakstrarroknskap, fíggjarstøðu og notum.

Arbeiðið er framt samsvarandi ISRS 4410, Uppgávur viðvíkjandi uppseting av fíggjarligum upplýsingum.

Við støði í okkara fakliga serkunnleika hava vit hjálpt tykkum at gera umskapanarjavnan samsvarandi ársroknskaparlógini. Vit hava hildið týðandi ásetingar í grannskoðanarlógini og etisku reglurnar fyri grannskoðarar, íroknað meginreglur viðvíkjandi integritet, partloysi, fakligum førleika og neyðugum nærlagni.

Umskapanarjavnin, eins og neyvleikin og fullfíggjanin av teimum upplýsingum, ið nýttar eru til uppsetingina av umskapanarjavnanum, eru tykkara ábyrgd.

Av tí at arbeiðið við uppseting av fíggjarligum upplýsingum ikki er ein váttanaruppgáva við trygd, er ikki álagt okkum at vátta neyvleikan ella fullfíggjanina av teimum upplýsingum, vit hava fingið frá tykkum til at seta upp umskapanarjavnan. Vit gera tí onga grannskoðanar- ella gjøgnumgongdsniðurstøðu um, hvørt umskapanarjavnin er gjørdur samsvarandi ársroknskaparlógini.

Tórshavn, hin 24.02.2021

**NUMO**
góðkent grannskoðanarvirki Sp/f

Bjarni Arnason
*Skrásettur grannskoðari*

NUMO

## NÝTTUR ROKNSKAPARHÁTTUR

### Alment

Umskapanarjavnin er settur upp samsvarandi ársroknskaparlógini og teimum kunngerðum sum eru knýttar at hesi.

### Immateriell støðisogn

Menningarkostnaðir fevna um kostnaðir, lønir og avskrivingar, ið beinleiðis ella óbeinleiðis eru tengdir at menningarvirksemi.

Ognarførdar menningarætlanir verða virðisásettar til kostprís við frádrátti av samlaðum av- og niðurskrivingum.

Tá ið menningarverkætlanin er liðug, verða ognarførdu menningarkostnaðir avskrivaðir við eins stórum upphæddum yvir mettu fíggjarligu livitíðina. Avskrivingartíðarskeiðið er vanliga 5 ár.

Vinningur og tap í sambandi við sølu av menningarætlanum verða gjørd upp sum munurin millum sølupris frádrigið sølukostnað og roknskaparliga virðið á søludegnum.

Vinningur ella tap verða innroknað í rakstrarroknskapin undir ávikavist øðrum rakstrarinntøkum og øðrum rakstrarútreiðslum.

### Materiell Støðisogn

Materiell støðisogn verður virðisásett til kostprís við frádrátti av samlaðum av- og niðurskrivingum.

Avskrivingargrundarlagið er kostprísur við frádrátti av væntaðum restvirði eftir lokna nýtslutíð. Grundøki verða ikki avskrivað.

Kostprísur er útveganarprísur umframt kostnaðir, ið beinleiðis eru knýttir at útveganini til dagin, tá ið ognin er klár at taka í nýtslu. Fyri egnar framleiddar ognir fevnir kostprísurin um beinleiðis og óbeinleiðis kostnaðir til tilfar, deilir, undirútvegarar og løn.

Kostprísurin á eini ogn verður býttur sundur í serstakar partar, ið verða avskrivaðir hvør sær um nýtslutíðin er ymisk fyri ymsu

Avskrivingin er eins stór fyri tey einstøku roknskaparárini og er grundað á metingar um nýtslutíðina á ognunum.

Ognir við einum kostprísi undir kr. 20.000 verða rakstrarførdar í útveganarárinum.

Vinningur ella tap verða innroknað í rakstrarroknskapin undir ávikavist aðrar rakstrarinntøkur ella aðrar rakstrarkostnaðir.

### Kapitalpartar í dótturfeløgum og leyst atknýttum feløgum

Kapitalpartar í dótturfeløgum og leyst atknýttum feløgum verða virðisásettir til kostprís. Í teimum førum at kostprísurin er hægri enn nettorealisatiónsvirðið, verður niðurskrivað til lægra virðið

### Áogn

Skuldarar verða virðisásettir við frádrátti av møguligum tapsvanda grundað a eina meting av hvørjum einstøkum skuldara.

### Skuld

Skuldin er tikin upp til áljóðandi virði pr. yvirtøkudagin.

### Tíðaravmarkingar

Tíðaravmarkingar fevna um móttiknar gjaldingar viðvíkjandi inntøkum í komandi roknskaparárinum.

NUMO

## UMSKAPANARJAVNI PR. 24.02.2021

**AKTIV**

| | |
|---|---|
| Meningarverkætlanir í gerð | 620.461 |
| Kapitalpartar í atknýttum virkjum | 40.000 |
| **STØÐISOGN TILSAMANS** | 660.461 |
| **Vørugoymsla** | **40.545** |
| Áogn hjá atknýtum virkjum | 784.289 |
| Onnur áogn | 56.995 |
| **ÁOGN TILSAMANS** | **841.284** |
| **Tøkur peningur** | **962.741** |
| **OGN Í UMFERÐ TILSAMANS** | **1.844.570** |
| **AKTIV TILSAMANS** | **2.505.031** |

**PASSIV**

| | |
|---|---|
| Felagskapitalur | 500.000 |
| Fluttur vinningur | 837 |
| **EGINOGN TILSAMANS** | **500.837** |
| Ognarar | 145.851 |
| Tíðaravmarkingar | 1.858.159 |
| Onnur skuld | 184 |
| **SKULD TILSAMANS (lang- og stuttfreistað)** | **2.004.194** |
| **PASSIV TILSAMANS** | **2.505.031** |

A J